

Savnsmynd: Álvur Haraldsen

# KÍF kom aftur á beint

**HONDBÓLTUR** Eftir tríggjar dystir upp í slag uttan sigur, komu kollfirðingar aftur á beint um vikuskiftið. KÍF vann greiðan sigur á StÍF

Uni Holm Johannesen

KÍF nærkast nú finaluplássunum av álvara. Kollfirðingar hava snávað í landskappingini móti Kyndli og H71 seinastu vikurnar, og síðsta vikuskiftið taptu teir fyri Neistanum í steypafinaluni. KÍF skuldi vinna seg aftur á beint hesaferð, serliga fyri at sleppa undan trýstinum frá VÍF og Kyndil, sum liva í vóninu um at røkka finalunum. Fyribils er eingin ivi um, at KÍF fer í finaluna. Uppibornið sigurin á StÍF í høllini í Kollafirði legði grundarlagið, og nú ræður um hjá teimum at halda fast.

## Eingi ivi

KÍF vann við fimm málum, 29-24. Spælið var ikki sannførandi, men tað leggja kollfirðingar ikki petti í. Nú ræður um at varðveita annað plássið. Jan Ottesen, venjari, og hinir í KÍF eru fimm stig framman fyri VÍF og Kyndil, sum eru nummar trý og fýra.

# Seinastu dystirnir

VÍF og Kyndil liva framvegis í vónini um at røkka finalunum um føroyameistaraheitið. Fimm stig eru á muni, og seks landskappingardystir resta í. Her er yvirlit yvir seinastu dystirnar.

*uni@sosialurin.fo*

6. mars: VÍF – StÍF
6. mars: Kyndil – H71
6. mars: KÍF – Neistin
11. mars: Team Klaksvík – KÍF
13. mars: StÍF – Kyndil
13. mars: Neistin – VÍF
16. mars: H71 – StÍF
19. mars: Team Klaksvík – Kyndil
20. mars: Neistin – H71
20. mars: KÍF – VÍF
26. mars: H71 – Team Klaksvík
27. mars: StÍF – Neistin
27. mars: Kyndil – KÍF
1. apríl: Team Klaksvík – StÍF
3. apríl: VÍF – Kyndil
3. apríl: KÍF – H71
10. apríl: StÍF – KÍF
10. apríl: H71 – VÍF
10. apríl: Neistin – Team Klaksvík

**Atlantic Airways Deildin** *Menn*

| NR. | LIÐ | DYSTIR | VUNNIN MÁL | TAPT MÁL | MUNUR | STIG |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Neistin | 18 | 638 | 490 | 148 | 35 |
| 2 | KÍF | 18 | 507 | 469 | 38 | 24 |
| 3 | VÍF | 18 | 501 | 464 | 37 | 19 |
| 4 | Kyndil | 18 | 467 | 465 | 2 | 19 |
| 5 | H71 | 18 | 489 | 486 | 3 | 16 |
| 6 | StÍF | 18 | 461 | 477 | -16 | 11 |
| 7 | Team Klaksvík | 18 | 430 | 642 | -212 | 2 |

# Treytirnar eru einfaldar

**HONDBÓLTUR** KÍF skal í øllum førum tapa tríggjar dystir, og VÍF skal vinna dystirnar, sum resta í. Tað eru krøvini til vestmenningar, sum liva í vónini um at røkka finalunum um føroyameistaraheitið



Mynd: Álvur Haraldsen

Uni Holm Johannesen

12 stig eru eftir at spæla um. KÍF er fimm stig frammanfyri. Kollfirðingar skulu tapa minst tríggjar dystir, og VÍF skal vinna dystirnar, sum resta í. Tað eru krøvini, sum eru sett til vestmenningar, um teir skulu spæla móti Neistanum í finalunum um føroyameistaraheitið. VÍF hevur havt stór sveiggj í sínum avrikunum. Teir løgdu illa frá landi í landskappingini, og tað merkist serliga væl nú. Við sigrinum á H71 í gjár, eru vestmenningar farnir undir seinastu royndina at fáa KÍF aftur á stigatalvuni.

## Togaðust leingi

Tað varð skjótt greitt, at H71 fór ikki at kappast um finaluplássini í hesum kappingarárinum. Neistin og KÍF struku avstað alt fyri eitt, og Kyndil og VÍF hava runnið aftaná. Hoyvíkingar vunnu greitt á kollfirðingum fyri tveimum vikum síðan, og tað birti undir eina vón, at H71 fór at fáa fult í Vestmanna í gjár. Tað eydnaðist ikki. Liðini togaðust leingi um leiðsluna, men miðskeiðis í seinna hálvleiki fór heimaliðið fram um við tveimum málum. Tann leiðslan helt sær til seinasta bríksl. VÍF vann 30-28.

## Byrja móti StÍF

Tað er lítið, sum bendir á, at VÍF fer at leggja kollfirðingar afturum seg á stigatalvuni. Úrslitini og avrikini eru ov óstøðug, og tað er sjáldan, at KÍF missir stig. Hinvegin – so leingi tað ber til, noyðast vestmenningar at troyta møguleikan. Hóast, tað er lítið realistiskt. Fyrsta royndin verður um tvær vikur, tann 6. mars. Tá vitjar StÍF í Vestmanna, og KÍF spælir móti Neistanum á heimavølli.

# Toppurin vann á botninum

**HONDBÓLTUR** Neistin tóktist ikki reiðiliga hava fingið armarnar niður eftir steypasigurin síðsta vikuskiftið. Í øllum førum vóru greipuvinnararnir ikki eins einaráðandi hesaferð sum onkutíð fyrr

Uni Holm Johannesen

Nú gleða spælararnir og venjararnir hjá Neistanum seg bara til finalurnar. Liðið hevur vunnið steypakappingina og sætið í finalunum um føroyameistaraheitið er tryggjað. Neistin hevur tískil einki at spæla fyri næstu vikurnar. Næstu dystirnir eru ikki petti meira enn venjingardystirnir hjá liðnum, sum hevur verið einaráðandi í føroyskum manshondbólti seinastu tvey kappingarárini.

Neistin var á vitjan hjá Team Klaksvík leygardagin. Ein dystur, sum bara skuldi avgreiðast. Tað sermerkti eisini spælið hjá steypavinnarunum. Neistin var stundum lítið sannførandi í verjuspælinum, og tað gav heimaliðið lætt spæl. Team Klaksvík fekk heili 30 mál, men gestirnir fingu seks mál fleiri. Úrslitið varð 36-30 til Neistan.

## Fyrireika seg

Ingi Olsen, sum er spælandi venjari hjá Neistanum, var burturstaddur hesaferð. Hann var tískil ikki við. Hansara uppgáva næstu vikurnar verður fremst av øllum at fyrireika hópin til finalurnar. Tað er helst ein vansi, at liðið hevur einki at spæla fyri næstu seks landskappingardystirnar. Nú skal Ingi Olsen syrgja fyri, at spælararnir taka uppgávurnar í ramasta álvara, og at leikararnir varðveita stórformin, sum liðið hevur verið í. Tað er ein torfør uppgáva, tá einki yvirhøvur stendur upp á spæl.

*uni@sosialurin.fo*